# Ungdómslandslið í hondbólti til Danmarkar mánadagin



*Mynd: Jens Kr. Vang*

*Mánadagin fara ungir føroyskir hondbóltsleikarar í hópatali til Danmarkar at royna seg. Tað eru U 18 og U 20 landsliðini hjá bæði kvinnum og monnum, sum skulu avstað*

HEINI Í SKORINI

Ungdómslandsliðini U18 og U 20 hjá kvinnum og monnum leggja mánadagin leiðina til til Ålborg í Danmark. Seinastu tíðina hava landsliðsvenjingar verið hjá hesum fýra landsliðum, og nú eru so endaligu landsliðini úttikin, sum skulu til Danmarkar mánadagin.

Ungdómslandsliðini skulu fyrst royna seg á venjingarlegu Ålborg, og síðani liggur leiðin til Frederikshavn, har tey eisini skulu luttaka í eini kapping. Venjararnir hjá landsliðunum eru Lotte Sørensen hjá yngru kvinnunum, Flemming Raben og Rene Christensen hjá eldru kvinnunum, og hjá monnunum eru tað Jacob Jónsson og Rógvi Nielsen sum hava ávikavist U 20 og U 18 landsliðini.

Men seinni í ár liggur ein sera spennandi uppgáva fyri framman hjá báðum teimum eldru landsliðunum. Síðst í mai og fyrst í juni skulu hesi bæði landsliðini nevniliga spæla dystir EM undankapping. Menninir skulu til Hvítarussland at royna seg, har teir skulu spæla tríggjar dystir í tríggjar dagar, og somuleiðis skulu kvinnurnar til Kroatia at royna seg.

Flemming Raben sigur, at tað er til hesar Em undandystir, at tey fyrireika seg til í løtuni.



# Flogbóltssambandið hevur aðalfund

*Leygardagin 15. apríl hevur Flogbóltssambandi tann árliga aalfundin á Hotel Hafnia*

HEINI Í SKORINI

Leygardagin 15. apríl klokkan 9.30 hevur Flogbóltssambandið árligan aðalfund á Hotel Hafnia.

Øll flogbóltsfeløgini kring Føroyar skulu eftir ætlan vera við á fundinum.

Á fundinum verður orðstýrari valdur, formansfrágreiðing verður givin, grannskoðaður roknskapur lagdur fram, innkomin mál viðgjørd, nevndir, tiltakslimir og grannskoðarar skulu veljast, og so verður ymiskt annað eisini á skránni.

Í mesta lagi trý umboð skulu møta fyri hvørt felag, og bara eitt umboð hevur atkvøðurætt. Fullmaktin skal verða undirskrivað til fundin av ábyrgdara fyri felagið.

Sum sagt verða nevndir, tiltakslimir og grannskoðarar valdir, og har er ætlanin, at feløgini skulu sjálvi koma við uppskotum.

Tey innkomnu málini eru venjarastuðul, dómarasamsýningar, spæliskipan komandi ár, leikbóltur komandi kappingarár, og so skal Klæmint Isaksen eisini greiða frá um útlendskar venjarar.

Flogbóltssambandið minnir á, at øll feløgini skulu møta á fundinum. Skal nakar møguleiki vera at fáa venjarastuðul til næsta kappingarár, er tað ein treyt, at felagið er umboðað á fundinum.

*Flogbóltssambandið minnir á, at øll feløgini skulu møta á aðalfundinum. Skal nakar møguleiki vera at fáa venjarastuðul til næsta kappingarár, er tað ein treyt, at felagið er umboðað á fundinum*




## Bókhaldshjálp

Til bókhaldið sóknast vit eftir bókhaldshjálp, sum kann byrja sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíð: 20 tímar um vikuna

Arbeiðsroyndir: Kunnleiki til bókhald er ein fyritreyt

Umsóknarfreist: Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. apríl 2000.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Jósvein H. Olsen.

**Hotel Hafnia**
tlf. 31 32 33 lok. 523

## Aðalfundur hjá »Hoyrnini«

Foreldrafelagið at deyvum og tunghoyrdum børnum hevur aðalfund í Deyvahúsinum leygardagin 29. apríl kl. 14.

Ina Wessberg og Finnleif Mortensen greiða frá um hoyritól og hjálpartól og svara spurningum.

Øll foreldur og starvsfólk hjá hoyriveikum børnum eru vælkomin.

**Skrá sambært lógum felagsins.**

**Nevndin**

Almanna- og Heilsumálastýrið

## Sjúkrasystir Heilsuatstøðingur

Á landssjúkrahúsinum Deild 3 (psykiatrisk seingjadeild) eru hesi avloysarastørv leys at søkja:

**Ein sjúkrasystir** á fulla tíð í blandaðum vaktum, frá 1. mai 2000 til 31. juli 2000.

**Ein heilsuatstøðingur** á fulla tíð, frá 1. mai 2000 til 31. juli 2000.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Anette Noer, deildarsjúkrasystir, tlf. 313540, lokal 426.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til
**Almanna- og heilsumálastýrið,**
Starvsfólkadeildin,
Eirargarður 2,
100 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 28. apríl 2000, kl. 14.00.

HOTEL VÁGAR

## LEIÐARI SØKIST

**Vit vænta at tú:**
- Arbeiðir sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevnir
- Er fyrikomandi
- Skapar góðan trivnað
- Hevur kunnleika til mál m.a. enskt

**Hotel Vágar bjóðar tær:**
- Eitt spennandi starv
- Góð starvsfólk
- Fjølbroyttar uppgávur

Á Hotel Vágum eru 25 kømur, matstova, góðar skeiðumstøður og cateringkøkur. Á hotellinum starvast 15 fólk.

Hotellið er ein partur av virkseminum hjá Flogfelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Una Danielsen tlf 340044.

Umsóknir skulu sendast til:

**Hotel Vágar**
Att.: Uni Danielsen
FO-380 Sørvágur

Umsóknarfreist 17. apríl 2000

## Virkisbygningur í Sørvági til sølu



Bygningur 430 m²
Grundøki 1914 m²

**Vatnsoyra Snikkaravirki pf.**
Telefon 33 21 77 · Telefax 33 31 66

## Eykaaðalfundur í Havnar Handverkarafelag

Boðað verður til eykaaðalfund í Havnar Handverkarafelag. Fundurin verður hildin á Hotel Hafnia fríggjadagin 28. apríl 2000 kl. 19.00.

Skrá:
1. Val av einum nevndarlimi
2. Innkomin mál.

**Nevndin
í Havnar Handverkarafelag**

## ÚTBJÓÐING

Fyri *Sjálvognarstovnin undir Kráarbrekku* í Klaksvík verður byggibúgvingararbeiðið í sambandi við bygging av eldraíbúðum og eldrasambýli hervið boðið út alment.

Arbeiðstøkurnar eru:

1. LENDISARBEIÐI
   - grevstur, spreinging, vegagerð, grovplanering, kloakk- og vatnleiðingsarbeiði, el-arbeiði v.m.
2. FJARHITAARBEIÐI

Útbjóðingartilfarið fæst frá mikudegnum 19. apríl við at gjalda kr. 2.000,- í veð á konto 4132607 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi týsdagin tann 18. apríl í ár og venda sær til Fuglø Arkitektar við váttan um, at upphæddin er goldin.

Boð skulu – saman við útbjóðingartilfarinum – latast Fuglø Arkitektum í afturlatnum brævbjálvum merktir

**»Kráarbrekka, byggibúgving«**

í seinasta lagi fríggjadagin 19. mai í ár kl. 15.00.

Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

HØVUÐSRÁÐGEVI
***FUGLØ ARKITEKTAR***
Gerðagøta 12, Postsmoga 1
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 78 87 - Fax 45 78 97

**SÁMAL JOHANNESEN**
Ráðg. verkfr.
Geilin 22
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 68 37 - Fax 45 68 37

**P/F SOFUS M. JAKOBSEN**
Ráðg. verkfr. F.R.I.
J. H. Schrøters gøta 22, Postsmoga 344
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 35 22 - Fax 31 06 22

**ODDBJØRN VÁGSLÍÐ**
EL-Anlegg
Á Brekku 1,
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 53 74 - Fax 45 78 74

## Ársfundur í KSF,

**Kvinnufelagasamskipan Føroya, verður á Glyvrum 19. mai 2000.**

Fundarskrá sambært lógini.

Uppskot til viðgerðar á fundinum skulu sendast til KSF, boks 1013, 110 Tórshavn í seinasta lagi 5. mai.

Fundurin verður settur í hølunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag Dýra Biðidag kl. 14.

Tær, ið ætla sær at vera við, skulu siga frá í seinasta lagi 8. mai hjá Annu Glyvradal á tlf. 447369 ella hjá Josfryd Danielsen á tlf. 441199.